Nr. 1 | 1. februar 2008 | 61. árið

Kirkjuligt
Missiónsblað

# At liva í óvissu

Martin Thomsen, sáli

Joh. 10, 24-26.

“Hvussu leingi vilt tú halda sál okkara í óvissu?” søgdu Jødarnir við Jesus. “Ert tú Kristus, tá sig okkum tað beint fram!” Hetta kom sum eitt neyðarróp. Men tað var ikki Jesus, sum helt sál teirra í óvissu, men tað var teirra egna vantrúgv. Eg havi sagt tykkum tað, og tit trúgva ikki,” segði Jesus.

Nógv menniskju ganga við einari óvissu í sínari sál. Um so er, at Gud er til, hví sigur hann tað ikki beint fram? Hvussu kann ein kærleiksfullur Gud lata alt hetta ganga um seg, sum fer fram í heiminum í dag? Tað hevur ongantíð í søguni sæð so myrkt út fyri menniskjunum sum í dag. Hví grípur hann ikki inn? Hvussu leingi vil hann halda sál okkara í øvissu?

Men tey eru ikki greið yvir, at tað er ikki Gud, men tað er teirra egna vantrúgv, sum heldur sál teirra í óvissu. Men tit trúgva ikki, tí at tit eru ikki av mínum seyðum. Hvat meinar Jesus við, tá ið hann sigur, at tit eru ikki av mínum seyðum? Tá ið Jesus sigur, at teir ikki vóru hansara seyðir, so vil hann eisini siga, at teir høvdu ikki hann til hirða, og tá ið teir ikki høvdu hann til hirða, so mátti tað vera djevulin, sum teir høvdu til hirða. Tað framgongur eisini av tí, sum hann sigur hjá Jóh. 8,44: Tit hava djevulin til faðirs,



og tað, sum faðir tykkara lystir, vilja tit gera. hann var manndrápari frá upphavi og stendur ikki í sannleikanum, tí at sannleiki er ikki í honum; tá ið hann talar lygn, talar hann av sinum egna, tí at hann er lygnari og faðir at lygnini."

Tað vísir seg soleiðis, at menniskjuni hava altíð lættari við at trúgva lygnini enn sannleikanum. Tað kemur oftani illa við hjá menniskjum at hoyra sannleikan. Men tá ið onkur fortelur eina lygn, tá spíla menniskjuni oyruni út. Men Jesus sigur, at faðirin at lygnini er djevulin, og trúgva menniskjur lygnini, so trúgva tey á djevulin.

Vit hoyra í Guds orði um ein ríkan mann og Lázarus; hin ríki glataðist, meðan Lázarus kom í himmalin.

Men at ríkmaðurin glataðist, var ikki tí, at hann var ríkur, men tað var tí, at sálin var í óvissu, hann var vantrúgvandi. Og tað, at Lázarus kom í himmalin, var ikki tí, at hann var fátækur, men tí, at hann hevði fingið vissu í sina sál, hann var trúgvandi.

Rikimaðurin, hann livdi í fagnaði og góðgæti, meðan Lázarus tráaði eftir at mettast av molunum, sum fullu av borðinum hjá hinum ríka. Men Gud greip inn. Tann sami Gud, sum menniskjur siga um: "Hví grípur hann ikki inn?" Tí tey trúgva ikki. Tey síggja einki, tí tey eru blind, og tey hoyra einki, tí tey eru deyv.

Jesus sigur hjá Matt. 13,15: "Tí at hjartað á hesum fólki er vorðið deyvt, og við oyrunum hoyra tey tungliga, og eygu síni hava tey latið aftur, til tess at tey ikki mega síggja við eygunum og hoyra við oyrunum og skilja við hjartanum, og venda um, so at eg kundi fingið grøtt tey."

Tað stendur eisini í Guds orði um ein ríkan bónda, sum segði við sál sina: "Slá teg nú til tols." Men tað besta dømi um tað, at sálin var í óvissu, tað var tað, at hann segði við sál sina: "Slá teg nú til tols."

ANDAKT

## Hin kærleiksfulli Frelsarin.

"Hennara mongu syndir eru henni fyrigivnar, tí at hon elskaði mikið; men tann, sum lítið er fyrigivið, elskar lítið."
Luk.7,47.

Ein hitamátari er frálíkur at hava. Hann mátar kulda- og hitastigini og sigur okkum, hvussu veðrið er. Inni í hjarta okkara kann eisini vera kalt ella heitt - og tekstur okkara í dag er næstan sum ein hitamátari, sum vísir okkara "hjarta-hitalag".

Vit lesa um Jesus, sum var gestur hjá Símuni - einum fariseara - og um syndafullu konuna, sum grátandi salvaði Jesu føtur. Tað hevur verið ein kenslurík stund hjá Jesusi, kanst tú ætla - men eisini hjá konuni.

Símun harafturímóti skilti einki. Jesus kann ikki vera nakar stórur profetur, hugsaði hann. Annars hevði hann vitað, hvat fyri ein vánalig kona hon er, sum nemur við hann. Men Jesus sá, hvat ið hann hugsaði, og segði: "Símun, eg havi nakað at siga tær!" Og so segði hann frá einum manni, sum hevði tveir skuldarar. Annar skyldaði honum 500 og hin 50 denarar, men av tí at eingin teirra átti nakað at gjalda við, strikaði hann alla skuld teirra.

"Hvør teirra man nú elska hann meira?" spurdi Jesus. "Tann, sum hann gav meira eftir!" svaraði Símun. Jesus vendi sær móti konuni og segði við Símun: "Eg kom inn í hús tíni; tú gavst mær ikki vatn til føtur mínar, men hon vætti føtur mínar við tárum sínum og turkaði teir við hári sínum. Tú gavst mær ikki koss; men hon helt ikki uppat at kyssa føtur mínar. Tú salvaði ikki høvur mítt við olju; men hon salvaði føtur mínar við smyrslum." Á, sum hann misrøkti uppgávu sína! Símun hevði ikki víst gesti sínum tann blíðskap, sum var vanligur siður tá á døgum. Henda gerð vísti skilliga sum nakar hitamátari, hvussu kalt hjarta hansar var - og hvussu lítið hann elskaði Jesus. Men tárini og kossarnir og kærleiksgávan hjá syndafullu konuni vístu, at hon elskaði nógv - at hjarta hennara brendi fyri Jesusi! Hon var komin at takka honum!

Hon fekk eisini ta mest undurfullu heilsanina í hesum heimi: "Syndir tínar eru fyrigivnar! Trúgv tín hevur frelst teg; far tú í friði!" Komið, latið okkum falla á knæ undir liðini á henni - og takka Jesusi!

Vilhelm Munch

Effie Campbell, týddi

Men nevniliga tá ið hann trúði, at tað stóð væl til, tá greip Gud inn. “Í nátt skal sál tin krevjast av tær.” Eitt menniskja kann vera so ríkt, sum tað vera vil, av hesum heimsins góðsi, men eigur tað ikki trúnna á Jesus í sinum hjarta, so kann tað, so ofta sum tað vil, siga við sál sina: “slá teg nú til tols.” Men tey blivu við at vera tað eymasta menniskja, sum nakrantíð hevur livað á foldum.

Dávid sigur: “Hin gudleysi eigur ongan frið, men tann, sum litur á Harran, letur hann náði sina vera rundan um. Jødarnir royndu at teppa Jesus og royndu at gera hann til einkis. Men tað var sum, at tað var so ringt, at gera seg leysan av honum. Men teir sóu, at tað bar ikki til, sálin hevði ongan frið. og so kom neyðarrópið: “Hvussu leingi vilt tú halda sál okkara í øvissu? Ert tú Kristus, tá sig okkum tað beint fram!” Men Jesus segði: “Eg havi sagt tykkum tað, og tit trúgva ikki.”

Hvussu nógv menniskju ganga ikki við einari óvissu í sínari sál. Tey royna at siga við sál sina: “Slá teg nú tols.” Men tey eiga ongan frið. Og tey hava hug at rópa hetta sama sum jødarnir: “Hvussu leingi vilt tú halda sál okkara í óvissu.” Men tað er ikki Gud, sum heldur sálina í óvissu, men tað er menniskjans vantrúgv.

Menniskjuni royna at billa sær sjálvum inn, at tað er ikki soleiðis, sum tað stendur í Guds orði. Eingin Gud

kann vera so harður at steingja menniskjur úti frá Guds riki. Og tí kunnu tey ongantíð fáa vissu í sina sál.

Hjá Jóh. 12,48 stendur soleiðis: “Tann, sum vanvirðir meg og ikki tekur við orðum minum, hevur tann, sum dømir hann: orðið, sum eg havi talað, tað skal døma hann á evsta degi.”

Tá ið vit hoyrdu at Oluf Palme var dripin, tá stóðu vit spyrjandi, hvussu kann slíkt henda.

Men Jesus segði við jødarnar: Tit hava djevulin til faðirs, og tað, sum faðir tykkara lystir, vilja tit gera. Hann var manndrápari frá upphavi.

Jødarnir søgdu at teir høvdu Gud til faðir, men Jesus segði at teir høvdu djevulin til faðir.

Jesus segði við teir jødar , sum høvdu tikið við trúgv á hann: “Um tit vera verandi í orði minum, tá eru tit av sonnum lærusveinar mínir, og tit skulu læra at kenna sannleikan, og sannleikin skal fría tykkum.

Um tí sonurin fríár tykkum, tá skulu tit verða av sonnum frælsir.

Martin Thomsen, sáli

---

**Nýggir haldarar**

Eg ynski at halda “Kirkjuligt Missiónsblað”.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr. og bygd/býur: ____________________

Undirskrift: ____________________

*At senda til:*
Kirkjuligt Missiónsblað, Purkugerði 7, FO-100 Tórshavn

# Farisearin og tollarin

## Luk. 18,9 - 14. Úr bókini Sæden er Guds ord

Suni Jacobsen,
týðir.

Til tess at skilja hetta líknilsi, er neyðugt fyrst at hyggja eftir hvørjum tað varð ætlað. Tað vendi sær til nakrar sum litu á seg sjálvar, at teir vóru rættvísir og roknaðu hinar fyri einki. (V9) Orðið rættvísur merkir her tað, sum vit kalla at vera í røttum sambandi við Gud. Jesus vendir sær til slík, sum halda tað vera í lagið við gudsviðurskiftum sínum, og hyggja niður á tey, sum tey meta, eru ikki í hesi støðu. Slík menniskju finnur tú allastaðni, har játtandi kristin eru. Vit munnu vera von við at hugsa um farisearar í hesum sambandi. Tað, sum Jesus ávarar ímóti í hesum líknilsi um farisearan og tollaran, er sera áleikandi okkara millum. Tað er rætt, at tað er - og má vera - eitt markaskjal millum kristin og ikki kristin. At strika hetta markaskjal, ella ikki at viðganga at eitt slíkt finst, soleiðis sum vit síggja tað í dag, er sera vandamikið. Hetta er ikki eitt frámerki vit hava sett, men Gud. Paulus sigur hetta klárliga í Gal. 6,14. "Men tað verði langt frá mær at rósa mær av øðrum enn av krossi várs harra Jesu Krists,- tí at fyri hansara skuld er heimurin krossfestur fyri mær og eg fyri heiminum." Hetta markaskjal elvir sanniliga ikki til hugmóð ímóti teimum, ið ikki eru frelst. Tað elvir tvørturímóti til umsorgan og kærleika, og tað hevur einki við tað mark at gera, sum Jesus talar um, at hyggja niðurá og lítisvirða tey, sum standa uttanfyri samfelag við Gud, slíkt er og verður eitt tekin um eginrættvísi. Eftir hetta skulu vit hyggja eitt sindur nærri at líknilsinum um farisearan og tollaran. Tað talar um tveir menn, sum fóru niðan í templið at halda bøn. Og tað er eisini tað einasta hesir menn líkjast í. Farisearin - navnið merkir teir avbyrgdu ella teir ið hava skilt seg burturúr - vóru ein flokkur ið fólk Ísraels hevði stórt álit á. Tað vóru menn ið høvdu sína einvísu hugsan um Guds orð, og tað sum hoyrdi Guds ríki til. Eisini tjóðskaparliga høvdu teir ein stóran leiklut, tí teir vóru sum eitt heimahermót ímóti rómverjum, í kúgan teirra av Ísrael. Fatanin av farisearunum, sum í dag er millum tey kristnu, er heilt skeiv. Vit vita, at farisearararnir eru mótstøðumenn kristindómsins, og at teir vóru fíggindar Jesu Krists. So eftirgera vit og skapa ein mótsetning til tað vit meta sum kristni, og nevna tað fariseismu. Men hetta hevur ógvuliga lítið við søguliga veruleikan at gera. Mennaskjaliga sæð vóru farisearar høgt í metum og avhildnir menn. Annar av hesum báðum, ið fór niðan í templið at biða var, við øðrum orðum, ein høgt virdur og avhildin maður, sum fólk høvdu álit á. Soleiðis var ikki við hinum manninum ið fór niðan í templið at biða: tollarin. Vit skulu ikki sammeta tollarar á Jesu døgum við tollarar í okkara tíð. Nú á døgum er ein tollari tænastumaður landsins ella, á hægri stigi, embætismaður. Tað er einki við tollarum í dag sum ger, at vit kunnu samanbera hann við syndarar, soleiðis sum gjørt verður í Nýggja Testamenti, tá talað verður um tollarar og syndarar.

Á Jesu døgum var hetta heilt øðrvísi. Ein tollari var í veruleikanum ein landasvíkjari. Hann var ein maður sum stóð í tænastu hjá hersetingarvaldinum. Uppá kostnað hjá landsmonnum sínum virkaði hann til fyrimuns fyri tann fígginda ið hevði Ísrael hersett. Slíkum menniskjum hevur eingin álit á. Tey verða vanvird, og fólk lítisvirða tey. So mikið vita vit frá okkara tíð, tá kríggið herjaði. Vit hugdu ikki við mildum eygum at landasvíkjarum. Tað gjørdu tey heldur ikki í Ísrael. Tað vóru so statt tveir sera ólíkir menn, ið fóru niðan í templið at gera bøn henda dagin.

**Farisearin og bøn hansara.**

Farisearin fekk sær pláss frammarlaga í templinum, fyri at kunna vera einsamallur, og helst eisini fyri at kunna verða sæddur av øðrum (samanber Matt. 6,5) . Farisearararnir høvdu sína egnu meining og frásøgn um hví teir gjørdu soleiðis, tá teir hildu bøn. Sjálvir vildu teir ikki vera við, at teir royndu at verða sæddir av menniskjum. Teir hildu harafturímóti, at teir áttu at vera tað sum nevnt verður "tann góða fyrimyndin." Við sínum góða fyridømi skuldu teir minna onnur á at biða, og á tann hátt vera ein beinleiðis áheitan á onnur um at biða. Jesus góðtekur ikki hesa umbering. Hann sigur, at teir gjørdu hetta fyri at verða sæddir av menniskjum (Matt. 6,5). Men sjálvir vildu farisearararnir á ongan

hátt góðtaka, at tað, Jesus segði, var rætt. Kortini hevði Jesus rætt.

Bøn farisearans ljóðaði soleiðis: "Eg takki tær Gud, at eg ikki eri sum aðrir menn, ránsmenn, órættvísir, horukallar ella líkasum hasin tollarin. Eg fasti tvær reisur um vikuna, eg lati tíggjund av øllum, sum mær ognast."

Eitt gamalt orðatak sigur: "Soleiðis sum eitt menniskja biður, soleiðis er tað." Skulu vit nýta hetta tiltak um bøn farisearan, sigur tað ikki so lítið um henda fariseara.

Fyrst kunnu vit seta spurningin: "Hvat biður hann um ?. Einki. Tað er í sjálvum sær talandi. Men harfyri hava vit ikki rætt at siga, at eingin meining er í hesi bøn. Vit gera manninum stóran órætt, um vit siga, at hann ikki meinti nakað við bønini. Tí, tað gjørdi hann so sanniliga. Hann takkar Gudi fyri, at hann ikki er sum onnur menniskju. Hetta verður av mongum lagt út sum, at hann stendur og breggjar sær fyri Gudi. Somuleiðis hevur verið sagt, at hann peikar á egnar gerningar yvirfyri Gudi. Einki av hesum er rætt. Vit gera farisearanum órætt, um vit leggja bøn hansara út á tann hátt. Vit skulu taka orð hansara sum tey eru søgd, og vit hava ikki loyvi til annað enn at slútta okkum, at hann meinar júst tað, hann sigur í bøn síni til Guds. Vit hoyra hvørki reyp ella sjálvsprísan, í vanligum týdningi, í hesum orðum. Men vit síggja ein mann ið takkar og hevur eina meining við tøkkini. Meiningin er týðilig. Tá hann ikki er sum aðrir menn, so er tað einans Gudi fyri at takka. Lá tað á honum sjálvum, hevði hann ikki verið smettin mætari enn onnur. Hann kundi havt verið bæði ránsmaður og drápsmaður. Tá hann ikki er vorðin tað, er tað ikki sær sjálvum, men einans Gudi fyri at takka. Tað vil hann av heilum huga takka Gudi fyri. Hetta er sjálvt innihaldið í bøn farisearans. Og samsvarar hetta heilt við tað vit fáa at vita um sjónarmið farisearanna úr læruskriftum teirra skriftlærdu í sein-jødadóminum. Eingin menniskja kann av sær sjálvum halda lógina, ella liva eftir vilja Guds. Tað kann hon einans við Guds kraft. Tað sum vit í dag ofta hoyra: Ein menniskja kann einki gera í egnari kraft, men má hava kraft frá Gudi til tess at liva, sum hann vil - tað kundu fariseararnir tikið fult undir við. Tað er hesin hugsunarháttur ið eisini liggur aftanfyri bøn farisearans her. Hóast tað ikki er nevnt her, vita vit, at farisearanir mettu syndajáttan og syndafyrigeving sum treyt fyri at kunna taka ímóti kraft Guds. Teir talaðu nógv um syndajáttan og syndafyrigeving. Teir vóru væl inni í skriftini og tóku gjarna til slík orð sum Sl. 37; 50 og 130 - fyri at nevna nøkur dømi. í øllum hesum sálmum er talan júst um syndajáttan og syndafyrigeving. Eftir sum farisearin heldur seg hava fingið kraft Guds til ikki at vera sum onnur menniskju, metir hann seg at fáa fyrigeving frá Gudi. Men í veruleikanum er tað júst tað hann ikki fær. Hetta síggja vit í endaorðunum í hesum líknilsinum, sum vit koma aftur til seinni. Gudsviðurskifti farisearanna eru allan vegin ígjøgnum følsk, í hvørjum er so hesin falskleiki.? Framum alt er hesin falskleiki skikkaður so, at hann ongantíð hevur viðurkent sannleikan um náttúru menniskjans. Hann hevur ongantíð í sannleika hugt at sær sjálvum. Farisearin hevur ongantíð skilt, at sjálv náttúra menniskjunnar er oyðiløgd av synd. Hóast Gud leggur kraft sína niður í eina menniskju, kann hon ikki liva eftir Guds vilja. Tað verður bert sum tá snikkarin fer at arbeiða við einum rotnum tilfari. Hesum høvdu farisearanir ongantíð tikið undir við. Teirra læra var at, treyðugt so kundi menniskjan í sjálvum sær halda lógina, uttan Guds kraft, men fyrst tá Gud gav eini menniskju kraft til tað, kundi tað lata seg gera, sjálv at halda lógina. At menniskjan má endurføðast, var teimum púra ókent. Teir løgdu Jesus undir hatur, tí hann talaði um eitt lív sum teir ikki høvdu, og tí, at hann var komin at geva teimum hetta lív. Á tveimum grundleggjandi økjum er fariseisma ikki bert ymisk í mun til kristindóm, men stendur í slíkari andstøðu, at tað í veruleikanum snýr seg um fíggindskap. Annað av hesum er, at syndajáttan av sær sjálvum gevur syndafyrigeving hjá Gudi. Tað lærdu farisearanir á Jesu døgum, og gera tað enn. Men tað er ikki satt. Fólk í milliónatali játta synd uttan at fáa fyrigeving. Farisearanir vóru nevniliga í andstøðu til alt, ið nevnast kundi staðgonguvirkandi sóning. Slík støð í skriftini har orð um hin stóra sáttardagin í 3.Mós.16 og til dømis orðið í Jes. 53 um staðgongu-sóningina, tulkaðu teir bert sum iðran, bót og bata.

Staðgonguvirkandi sóning var nakað teir skúgvaðu langt frá sær. Eftir Guds orði, er tað bótoffursdeyði Jesu Krists, ið er grundarlagið undir synda-fyrigevingini. Tað er í Jesu navni prædika eigur at verða umvending og syndanna fyrigeving fyri øllum fólkasløgum, og byrjast skal frá Jerúsalem. (Luk.24,47) í Aps. 10,43 sigur Pætur: "Honum (Jesusi) bera allir profetarnir tann vitnisburð, at ein og hvør, sum trýr á hann, skal fáa fyrigeving syndanna fyri navn hans skuld." Slíkum hildu farisearanir seg ikki at hava brúk fyri. Tað sama kann sigast um eitt ótal av menniskjum í dag. Annar grundleggjandi munurin millum fariseismu og kristindóm er endurføðingin. Hon er als ikki til í fariseismuni. Fariseisma umboðar ein

"kristindóm" bygdan á náttúrligar menniskjaligar fyritreytir, meðan allur sannur kristindómur er treytaður av nýggjum lívi, og nýggjari føðing. (Jóh. 3 samrøða Jesusar við Nicodemus). Tað er einki til hindurs fyri, at ein vanlig náttúrlig menniskja fer undir at bera seg at sum ein kristin. Hon kann royna at fylgja tí sum Guds orð leggur kristnum eina við, og broyta livihátt sín, so hann ikki líkist liviháttinum hjá vanligum menniskjum. í mannaeygum sýnist tað tá sum um henda menniskja er vorðin kristin, og mong vilja siga, at hon livir sum ein kristin. Men har mega vit spyrja: "Verður ein menniskja kristin av at hátta sær sum ein kristin.? Jesus svarar: "Tað sum er føtt av holdinum, er hold, og tað, sum er føtt av andanum, er andi." (Jóh. 3,6) Tað finst einki tillagingarskeið millum tað at vera ein náttúrlig menniskja og at gerast kristin. "Holdið", tað vil siga, hin náttúrliga menniskjan, er og verður hin sama náttúrliga menniskjan, annaðhvørt hon er verðslig, ella andaliga vakt, annaðhvørt hon er ónd ella góð, annaðhvørt hon er viðurkend av menniskjum sum kristin, ella ikki. Tann náttúrliga menniskjan er og verður tann náttúrliga menniskjan. Eins lítið og apan verður ein menniskja, bert tí hon fer at hátta sær sum ein slík, verður ein náttúrlig menniskja kristin, bert tí hon háttar sær sum ein kristin. Tað er við endurføðingini - tí at fáa eitt nýtt lív frá Gudi í hjartað, at nakað kyknar upp í menniskjum, sum ongar fyritreytir eru fyri í tí náttúrliga menniskjanum.

Hetta nýggja lívið er Guds egni Heilagi Andi sum tekur búgv í mannahjartanum, og tað, sum tá er føtt av Andanum, er Andi. Sum áður nevnt var hetta farisearunum heilt ókent. Tað er eisini ókent fyri mongd av menniskjum, sum í dag játta seg sum kristin. Tá Jesus kallar farisearanar falsarar (Matt. 23), er tað ikki tí, at teir ganga runt og lúgva, ella siga slíkt, ið teir ikki meina, ella bera seg at og fara fram við eyðsýndum falslótum. Mennaskjaliga sæð vóru farisearanir heiðurligir menn. Tað eru teir óivað eisini í dag. Tá Jesus kallar teir falsarar, er tað, tí at teir geva sær sjálvum skin av at hoyra Gudi og hansara heimi til, meðan teir í veruleikanum ikki gera tað. Teir hoyra til heimin hjá tí náttúrliga menniskjanum, sum liggur í tí ónda. Stutt sagt: Tað snýr seg um menniskju ið ganga fyri ella látast at vera kristin, uttan at vera tað. Tað er falsan teirra.

**Bøn tollarans**

Tollarin vágaði sær ikki langt inn í templið, men helt seg uttarlaga. Tað stendur, at hann stóð langt burturi. Hann bjóðaði ikki til so mikið sum at venda eygu síni móti himli, men sló seg fyri bringuna og segði: "Gud náði meg syndara."

Hesin maður var landasvíkjari. Hann visti hvussu ringt orð hann hevði millum fólk. Hann visti, at hann hevði spilt lív sítt. í roynd og veru hevði hann lítla vón um bjarging. Men kortini kann hann ikki lata vera við at rópa til Guds, og rópið er í orðsins rúmastu merking eitt neyðarróp. Hesin maður hevur ikki hjálp fyri neyðini, honum tørvar frelsu og bjarging. Hesin maður er glataður, ein, ið vón ikki er fyri. Hann veit kanska ikki so nógv um Jesus. Men Jesus sigur seg í hvussu so er at vera komnan at leita upp og frelsa slík menniskju, og vit vita eisini, at tollarar og syndarar hildu seg nær at honum, fyri at lýða á hann. Luk. 15, 1-3.

Fara fólk í slíkari neyð at ákalla Gud, so er vón. Tað síggja vit her. Henda bøn hevur verið hoyrd á himli. Jesus sigur um hendan mann, at hann fór rættvísgjørdur heim. Tað merkir ikki bert, at hann hevði fingið syndafyrigeving, men at hann í Guds eygum var fríkendur frá allari synd síni. Frammanfyri Guds ásjón stóð hann, sum um hann ongantíð hevði syndað. Í grundtekstinum stendur tað veruliga, at hann fór rættvísgjørdur heim í hús sítt, tvørturímóti hinum.

Tvørturímóti farisearanum, sum einki svar fekk úr Himlinum, og helst ikki hevði væntað sær tað, fær tollarin sjálvt tað æviga lívið. Tí, har menniskjan er rættvísgjørd, og hevur syndanna fyrigeving á hesum grundarlagi, har er lív og sæla. Hvussu nógv tollarin í fyrstani skilti av hesum, sigur Jesus einki um. Men hann sigur, hvat hendi hesum tollara í Himlinum. Sum ein samandrátt av hesum líknilsi, sigur Jesus, at tann ið eyðmýkir seg sjálvan, skal vera upphevjaður, og tann ið hevjar seg sjálvan, skal verða eyðmýktur.

At eyðmýkja seg sjálvan merkir í veruleikanum, at seta seg har ein hoyrir heima: í plássi teirra glataðu og dømdu. Tað merkir ikki bert, at seta seg í ein vána sess, men tað merkir fyrst av øllum, at seta seg í ein vanærandi sess, at seta seg har eingin metir ein fyri at vera nakað, og ein ikki væntar at verða virdur av nøkrum. Hann vil Harrin sjálvur upphevja, og seta hann har, ið Harrin heldur, at hann eigur at vera. At hevja seg sjálvan upp, merkir í roynd og veru tað sama sum at lýsa seg sjálvan sum ein góðan kristnan. Slíkt er vandamikið at gera. Latið okkum tí taka við tí lærdómi av hesum líknilsi, at vit seta okkum har vit eiga at vera. Vit koma helst ongantíð longri enn til tað, at bønin vit hava nortið við hóskar til okkara, har sagt verður: "Gud náði meg syndara."

# Eldhugaðir Missiónsvinir

Hann kom inn á skrivstovuna hjá missiónini ein dagin. Hann mundi vera umleið 70 ára gamal. Nú orkaði hann ikki tað sama sum fyrr, men tað var nakað, sum trokaði á, sum hann mátti tala við onkran um. Ofta lá hann vakin um næturnar og hugsaði. Hvat var tað so sum hann hugsaði so nógv um? Jú,tað var hetta, at Guð á ein serligan hátt vitjaði Etiopia við einari veking, sum vit ikki kundu rokna við hendi aftur. Fólk komu í flokkum til missiónstøðirnar at hoyra um Jesus. Tey biðja um at fáa lærarar og evangelistar út í bygdirnar at læra tey. Men vit mugu siga nei. Vit kunnu ikki hjálpa tykkum. Og so fara tey heimaftur, útaftur í myrkrið. Og grundin er, at missiónsfólkið her heima ikki geva, sum tey áttu. Jú, tað eru tey sum geva og ofra og viðhvørt rósa vit okkum av, at vit eru so ófør at geva, men vit geva ikki so nógv sum vit áttu. Um bert ein partur av missiónsfólki gav tíggjund, so hevði fíggjarætlanin hækka munandi. Hetta sigur hesin gamli missiónvinurin. Sjálvur hevur hann tað gott, hví liggur hann so vakin um næturnar? Tað er eldurin, missiónseldurin, sum brennir í hjarta hansara. Nakrar dagar seinni, kom ein maður, á sama aldri inn á skrivstovuna,. Hann kom úr eini bygd vestanífrá. Blíður er hann. Smílið leikar um munnin frá tí hann kemur til hann fer. Tað er um missiónina alt snýr seg um. Hann er so glaður fyri at sleppa at vera við í Guðs ríkis søk. Hann sigur, at hann er við í einum missiónsringi. Vit hava tað so gott saman. Um eingin talari kemur, so klára vit okkum sjálvi. Vit lesa Guðs orð saman og so hevur hvør sín vitnisburð. Vit fara altíð ríkari heimaftur, sigur hann. So sigur hann nakað gleðiligt. Um tað ikki liggur fyri hjá onkrum, at koma tað kvøldið, so gevur hann dupulta gávu til missiónsarbeiðið næstu fer hann kemur. Missiónsarbeiðið skal ikki líða fyri tað at hann ikki kundi koma seinast. Eg eri so glaður fyri at fáa loyvi at vera við í missiónsarbeiðum, sigur hann við sínum ljósa smíli, tá ið hann fer. Aftur ein eldur, ein fagur eldur, á lívsins kvøldi.

Sama dag, fari eg á posthúsið eftir einum virðisbrævi. Eg síggi at tað er frá “ honum”. So veit eg hvat tað snýr seg um. Í fyrra árið kom ein tjekkur uppá 7500,00 kr. í juni mánað, í fjør, kom aftur eitt bræv. Hann skrivaði: “Tað sær ikki væl út nú við grøðini, so eg sendi tær 5000,00 kr. til arbeiði, nú meðan eg havi tær.” Í november mánað sama ár, kom aftur bræv. “Tá ið eg sendi pening seinast,” skrivar hann, sá tað ikki so væl út við grøðini, og eg helt at tað ikki bleiv meira at senda hetta ári, men úrslitið bleiv nógv betur enn eg hevði væntað. Her sendi eg 500,00 kr. afturat. I dag kom aftur bræv frá hesum sama bónda. Hann er eisini farin um ellismarkið. Eg var eitt sindur spentur. Hvat nú? Eg var ikki lítið rørdur tá ið eg las: “Eg sendi hervið nakrar krónur til missiónina, ein kekk uppá 10,000 kr. .” Eg hugsi við mær. Ikki øll kunnu geva so nógv. Gud signar eisini tað lítlu gávuna, sum ein fátæk einkja gevur, eftir førimuni. Men gott hevði verið, um vit høvdu ordan í gevaratænustuni, so at vit sum Paulus ápostul skrivar, geva sum vit fáa eydnu til. Tá hevði ikki væntað peningur, til at fáa evangeliið út til teirra, sum enn ikki hava hoyrt boðskapin um Jesus.

Men tá má kærleiki Krists, fylla okkum, soleiðis at eldurin logar á lívskvøldinum og á lívsins vári, ja, gjøgnum alt lívið.

Trygve Bjerkrheim.
(Skrivað 1976.)

Elsa Jacobsen týddi

# Hirðarópið

Nøkur fólk vóru farin til Heilaga Landið at ferðast. Har sóu tey ofta seyðafylgi, og ferðaleiðarin bað tey leggja til merkis, at hirðin gekk altíð fyrst, og seyðafylgið elti hann. Ein dagin sóu hesi ferðafólkini tað øvugta, og tey gjørdu ferðaleiðaran varan við tað. Hann undraðist nógv á hetta, tí hetta hevði hann ongantíð sæð fyrr øll tey árini, hann hevði ferðast í Ísrael. Hann fór tí yvir til mannin, sum rak seyðirnar, og spurdi, hvussu hetta bar til, um hann ikki fekk seyðirnar at akta seg? "Á, eg eri ikki hirði, men slaktari," svaraði maðurin, "eg reki seyðin til sláturhúsið!"



Í 10. kap. av Jóh. ev. lesa vit so vakurt um hin góða hirðan, sum er Jesus, sum setir lívið til fyri seyðirnar. Í ørindi 4 stendur: "Tá ið hann hevur latið allar seyðir sínar út, gongur hann **undan** teimum, og seyðirnir **fylgja** honum, av tí at teir kenna reyst hansara." Ja, soleiðis er Jesus, hann gongur undan, og so stendur okkum frítt fyri, um vit vilja elta hann ta leiðina, sum endar uppi í himlinum. Hann noyðir ongan. Tímir tú ikki til himmals, so sleppur tú undan. Men tað finnast bara tveir vegir. Hin endar í ævigari glatan. Heimurin lokkar og tølir teg við sínum lysti og spæli. Hann tosar um frælsi. Men áðrenn tú rættiliga veitst av tí, so ert tú bundin og hevur fløkt teg inn í syndanna garn, og tá er torført at sleppa leysur.

Ein maður segði mær einaferð, at hann sum smádrongur var úti og spákaði við pápa sínum í Norðursælandi. Sum teir gingu, komu teir til ein bóndagarð, og bóndin sjálvur stóð í túninum. Av tí at pápin kendi hann, steðgaðu teir á at práta.

"Er tað satt, at tað er eitt, tey kalla fyri hirðarópið?" spurdi pápin. "Jú, so er," sigur bóndin. "Hirðarópið er eitt ljóð, sum hirðin rópar. Seyðirnir hjá honum kenna hansara kall og koma beinanvegin, tá ið hann letur tað ljóða. Eg havi eisini mítt hirðaróp." Og so segði hann pápanum, hvussu rópið var. Pápin royndi fleiri ferðir at herma eftir honum og rópa hetta hirðarópið til seyðin, sum lá á bønum, men einki hendi. Teir ikki so mikið sum lyftu høvdunum. Men tá ið so bóndin sjálvur læt hirðarópið runga, lupu allir seyðirnir avstað og tyrptust um bóndan.

Hetta minnir meg á eina frásøgn frá tí skotska hálandinum. Ein bóndi og kona hansara høvdu í mong ár ynskt sær og biðið Gud um at fáa eitt barn. Nú vóru tey komin nakað upp í árini; men enn vóru tey barnleys. So hendi kortini tað, at tey fingu eitt barn, eina dóttur. Konan var glað, tí hon hevði ynskt sær eina dóttur; men maðurin hevði heldur viljað havt ein son, sum kundi hjálpt honum at røkt seyðin. Men so helt hann, at tað, sum um ráddi, var, at barnið var væl skapt, og gentan kundi eisini koma at gera nyttu. Hon kundi hjálpa konuni heima. Gentan vaks og treivst væl. Ein dagin segði pápin við hana: "Hevði tú havt hug at komið út í hagan til

stuttleika við mær? Eg fari at hyggja eftir seyðinum."

Jú, gentan helt tað vera spennandi. Tá ið tey komu fram, læt pápin hirðarópið ljóða, og seyðurin tusti beinanvegin yvir til hansara. Gentan helt hetta vera stuttligt og vildi eisini royna seg við hirðarópinum; men seyðirnir aktaðu ikki hana. Hon royndi aftur og aftur. Men tað segði hitt sama. Kortini, tá ið nøkur tíð var gingin, eydnaðist tað hjá henni, og nú hon dugdi hirðarópið, lýddu seyðirnir eisini hennara reyst.

Árini gingu, og tá gentan var vaksin, fór hon inn til hin stóra býin at lesa. Hvørt kvøld skrivaði hon heim og segði frá, hvussu hesin dagurin var gingin hjá henni. Men so fóru brøvini at fækkast. Dagar gingu ímillum, har foreldrini einki bræv fingu. So fóru vikur at ganga ímillum, ja, mánaðir, og so hildu brøvini heilt uppar at koma, og foreldrini vóru so sorgarbundin.

Tey gjørdu so av, at pápin skuldi fara inn til hin stóra býin at leita eftir tí burturmistu dóttrini. Hann fór á politistøðina, á fólkayvirlitið og fleiri aðrar almennar skrivstovur at spyrja eftir dóttrini. Menn blaðaðu í stórum bókum og ringdu til Hanus og Janus uttan úrslit. Gentan kom ikki afturíaftur.

Pápin fór so út á gøtuna at vála og steðgaði ungdómum, sum hann helt vóru á hennara aldri og gingu í skúla. Hann spurdi, um tey kendu eina gentu, sum æt so og so, og sum hevði gingið í tí og tí skúlanum? Men eingin visti nakað um hana. Sorgarbundin fór pápin aftur á gistingarhúsið og ætlaði at fara heim aftur. Tað var vónleyst at finna dóttrina. Tað var sum at leita eftir einari knappanál í einari ovurhonds stórari sátu.

Tá brádliga slerdi tað niður í hann: hirðarópið. Hann visti, at dóttirin kendi tað, og bara hon hoyrdi tað, vildi hon vakna við og fylgja tí. Teir komandi dagarnar gekk pápin oman og niðan eftir gøtunum, og við jøvnum millumbilum læt hann hirðarópið gella út. Ljóðið í sjálvum sær sigur einki teimum, sum ikki kenna tað, og fólk hildu tí henda geylandi mannin vera øran; men líka legði hann í.

Inni í einum húsum sótu nøkur ungfólk og spældu kort, tey vóru øll drukkin. Brádliga vaknaði ein genta við av einum rópi niðri á gøtuni. Tá rópið ljóðaði aðru ferð, leyp hon á føtur og oman á gøtuna. Har kendi hon pápa sín beinanvegin og leyp um hálsin á honum, og so fór hon heim við honum, heim til mammu sína uppi í skotska hálandinum.

Jesus sigur: "Mínir seyðir hoyra reyst mína, og eg kenni teir, og teir fylgja mær." (v. 27) Um tú skalt hoyra rødd Jesusar, mást tú kenna hana, og tú kemur at kenna hana við at lesa Guds orð, sum er Bíblian. Halt teg nær at honum, les Guds orð hvønn dag, so tú kanst kenna rødd hansara og vita, hvat ið vilji hansara er.

E. Campbell.



# Hin miskunnsami Sámáriubúgvin.

## Luk. 10,23-37. Úr bókini: Sæden er Guds ord.

Suni Jacobsen,
týðir.

Til tess at skilja hetta líknilsi, mega vit hyggja eftir hvørjum samanhangi tað stendur í. Tað er ein heilt ávís orsøk til, at Jesus framber hetta líknilsi. Tað byrjar við - sum vit síggja í 23. ørindi - at Jesus vendir sær til lærusveinar sínar og sigur við teir: "Sæl eru tey eygu, sum síggja tað ið tit síggja. Tí at eg sigi tykkum, at mangir profetar og kongar vildu fegnir síggja tað, og fingu tað ikki at síggja, og hoyra tað, sum tit hoyra, og fingu tað ikki at hoyra." Hetta vakti stóran ans. Hvat var tað ið lærusveinarnir sóu, sum onnur menniskju ikki sóu.? Teir sóu hvør Jesus í veruleikanum var, og teir vóru førir fyri at taka ímóti talu hans. Vit fáa ein varhuga av tí í Evangeliinum hjá Jóhannesi í 6. kapitli, har Jesus sigur við fólkið: "Tit hava sæð meg og trúgva tó ikki." (Jóh. 6,36) Jesus hevði fyri eygum teirra gjørt eitt stórt undurverk. Hann hevði útvega mat til 5000 menn, umframt konur og børn, sum til steðar vóru. Av 5 byggbreyðum og fýra fiskum. Fólk vóru hugtikin, og ætlaðu at taka hann við valdi og gera hann til kong. Men Jesus fór aftur avsíðis niðan á fjallið, einsamallur í einsemi. Hetta undur átti at havt gjørt fólkinum greitt hvør Jesus í veruleikanum var, men tey góvu tí ikki gætur. Tá tey dagin eftir leitaðu eftir Jesusi í Kapernaum, sigur Jesus við tey: "Tit leita eftir mær, ikki tí at tit sóu tekin, men tí at tit ótu av breyðunum og vórðu mett." (Jóh. 6,26) Jesus segði týðiliga og greitt, hvør hann var, og hví hann var komin í heimin. Hann segði um sjálvan seg, at hann var tað livandi breyði sum komið var av Himli, til tess at heimurin skuldi fáa ævigt lív við honum. Men fólkið tók sær tykni av hesi talu og segði: "Er hetta ikki Jesus, sonur Jósefs, sum vit kenna bæði faðir og móður at.? Hvussu kann hann tá siga: "Eg eri komin niður av himni.?" (Jóh 6,42) Jesus gekk ljóslivandi teirra millum og boðaði Guds ríki. Fólk sóu hann og sóu hann kortini ikki,- tey hoyrdu hann, men tóku sær tykni av boðskapi hansara. Hvussu kundi hetta bera til.? Tað er ein áleikandi spurningur, tí støðan er í veruleikanum tann sama í dag, sum á døgum Jesusar. Flest øll lesa og hoyra um Jesus, men tey síggja hann kortini ikki, og tey skilja ikki boðskap hansara, soleiðis at tey verða frelst av honum og fáa ævigt lív. Jesus hevur týðiliga og greitt sagt okkum, hvat orsøkin er til at orð Guds er fjalt fyri vísum og vitrum, og kunnugt fyri ómyndingum. (Matt. 11,25ff) Hann prísar Gudi fyri at tað er Guds egna ráð til frelsu, í hesum sambandi sigur hann eisini, at eingin kennir Sonin uttan Faðirin, og eingin kennir Faðirin uttan Sonurin og tann ið Sonurin vil opinbera seg fyri. Við "vís og vitug" meinar Jesus ikki við klók menniskju, ella menniskju, ið hava stóran kunnleika. Við "Ómyndingar" hugsar hann heldur ikki um tey sum eru óvitandi og evnafátøk. Vís og vitug merkir tey, ið seta seg sjálvan í eina dømandi støðu mótvegis Bíbliuni og Guds orði. Tey seta seg sjálvan upp sum ein myndugleika yvir Guds orði. Tað er heilt vanligt millum gudfrøðingar og mong onnur í dag. Tey ynskja ikki sjálvi at gera tað, og kortini er tað júst tað tey gera. Tá hugsað verður um ómyndingar, so eru tað tey hvørs hægsti myndugleiki er Guds orð. Viðvíkjandi Guds orði hava tey einki at skula hava sagt. Orð Guds er autoritetur teirra og myndugleiki. Henda tala Jesusar ger okkum eisini greitt, at eingin menniskja av sær sjálvum kann síggja og skilja hvør Jesus veruliga er, uttan so, at tað verður opinberað henni av Faðirinum á Himni. Tað er einans Faðirin ið kennir Sonin. Opinberar hann okkum, hvør Sonurin er, síggja vit hann. Fær hann ikki opinberað hetta fyri okkum, síggja og kenna vit hann ikki. Á sama hátt kunnu vit heldur ikki kenna Faðirin og síggja hann, uttan at Jesus opinberar hann fyri hjarta okkara. Tað var hetta lærusveinarnir høvdu fingið høvið at royna. Tá Pætur játtaði fyri Jesusi: "Tú ert Kristus, sonur hins livandi Guds." svaraði Jesus honum: "Sælur ert tú, Símun Jónasarson, tí at hold og blóð hevur ikki opinberað tær tað, men faðir mín, sum er í himlinum." (Matt. 16,16f) Áðrenn frelsan varð fullgjørd, áðrenn uppreisnina, høvdu lærusveinarnir ikki tann

fullkomna kunnleika um Jesus, sum teir fingu seinni, men teir høvdu longu, meðan hann enn var teirra millum fingið loyvi at uppliva, at Faðirin á Himni opinberaði fyri hjørtum teirra, hvør Jesus veruliga er, soleiðis at teir í roynd og veru sóu hann og skiltu hann og vóru førir fyri at taka ímóti talu hansara. Tað sæst týðiliga í játtan Pæturs, móti endanum á Jóhannes Evangeliinum 6. kap. "Harri hvønn skulu vit fara til? Tú hevur orð hins æviga lívs." (v.68-69). Tí kundi Jesus venda sær til lærusveinarnar og siga: "Sæl eru tey eygu, sum síggja tað ið tit síggja." Hetta elvdi til mikla øsing hjá teimum flestu. Serliga elvdi tað til mótstøðu frá teimum lógkønu. Teir vóru ikki í iva um, at lærusveinarnir sóu nakað, sum teir sjálvir ikki áttu. Hetta fær ein lógkønan at freista Jesus og spyrja hann: "Meistari, hvat eigi eg at gera, fyri at eg kann arva ævigt lív?" Hesin spurningur verður settur av manni, sum í mong ár hevur kunnað Gamla Testamentið uttanat. Hann spyr ikki, tí at hann ikki heldur seg sjálvan vita tað. Men hann vil vita hvat Jesus svarar uppá ein slíkan spurning. Fyri okkum menniskju er spurningurin sermerktur: "Hvat skal eg gera?" Hetta spyrja øll menniskju "Hvat skal eg gera til tess at ognast frelsuna?" "Hvat skal eg gera fyri at gerast ein kristin?" "Hvat skal eg gera fyri at fremja Guds vilja?" í Jóh. 6,28 síggja vit hetta hjá jødunum: "Hvat skulu vit gera, fyri at kunna í dag hoyrir tú henda spurning allastaðni: "Hvat skal eg gera?", og hugsunarhátturin er: Um eg bert geri tað sum rætt er, so fari eg saktans at uppliva tað, sum Gud hevur lovað í orðið sínum. Jesus svarar hesum spurningi. Hann vísir til Guds orð, ið greiðir frá, hvat Gud vil, at vit menniskju skulu gera: Orð lógarinnar. Hann svarar hesum lógkøna: "Hvat stendur skrivað í lógini? Hvussu lesur tú? (Luk. 10,26). Hin lógkøni hevur eitt sera gott svar uppá henda spurning. Hann tekur samanum tað sum lógin samanlagt metir sum tað stóra endamálið: "Tú skalt elska Harran, Gud tín, av øllum hjarta tínum og av allari sál tíni og av øllum alvi tínum og av øllum huga tínum og næsta tí sum sjálvan teg." Jesus gevur honum eisini rætt í hesum svari: "Beint svaraði tú; ger tú hetta og tú manst liva." Men um somu tíð sum Jesus gevur hinum lógkøna rætt í lýsing síni av lógini, vísir hann, at hin lógkøni livir ikki eftir tí, sum hann sigur er endamál lógarinnar. Hin lógkøni hevur ikki elska Gud av øllum hjarta sínum. Hann hevur ikki elska næsta sín sum sjálvan seg. Tá Jesus sigur hetta við hann: "Ger tú hetta", gerst tað hinum lógkøna greitt, at hann júst ikki hevur gjørt tað, sum boðini krevja. Tí kennir hann eina sterka trongd til at rættvísgera seg sjálvan, bæði fyri Jesusi og øðrum, ið møguliga hava hoyrt hesa samrøðu. Tí spyr hann: "Hvør er tá næsti mín?" Sum svar uppá henda spurning, er tað at Jesus ber fram líknilsi um hin miskunnsama Samariubúgvan. Tað er ikki bert hin lógkøni ið fær svar. Men tað er svar Guds til øll menniskju, sum vita við sjálvum sær, at liv teirra ikki samsvarar tí, tey vita at Gud krevur av teimum í orði sínum. Tað er svar Jesusar til øll, ið vita, at tey hava svikið tað sum rætt er, og nú ganga undir eini ákæru og dømdari samvitsku mótvegis Gudi. Líknilsið er ein einføld frásøgn um ein mann, ið var á ferð frá Jerúsalem til Jeriko. Strekkið er umleið 30 kilometrar. Hæddarmunurin er ógvuliga stórur. Jerúsalem liggur meira enn 800 metrar yvir havinum, meðan Jeriko liggur umleið 400 metrar undir sjóvarmálanum. Ein so stórur hæddarmunur á so stuttum strekki ger, at brekkan úr Jerúsalem til Jeriko verður sera brøtt. Leiðin var sum skapt til ránsmenn at krógva seg í. Lætt var at leggja á tey sum har ferðaðust, uttan at verða sæddur, og ikki var langt ímillum álopini. Soleiðis var við manninum, sum líknilsið greiðir frá. Hann varð álopin av ránsmonnum, sum bæði nektaðu og slóu hann, rýmdu frá honum, og lótu hann liggja hálvdeyðan eftir. Hetta var eingin óvanlig hending á hesum vegastrekki. So hendir tað, at ein prestur fer oman sama veg. Hann sær henda neyðars mann, men fer framvið. Somuleiðis kemur ein Levittur, sær mannin og heldur leiðina fram, uttan at steðga. Ein skuldi hildið, at bæði presturin og levitturin vóru slíkir ið ein kundi væntað sær hjálp frá. Báðir vóru teir jú tænarar í templinum. Men frá teimum kom eingin hjálp. So kemur ein Sámáriubúgvi, ein, ið annars er fíggindaliga sinnaður móti jødum. Tá hann, langt av leið komin, kemur fram á og sær henda mann liggja meisladan við vegin, fær hann samkenslu við honum, fer yvir til hann, stoytir olju og vín í sár hansara og bindur um. A henda hátt sóttreinsar hann, millum annað, sárini og hjálpir hetta til, at tey kunnu lekjast. Hann lyftir hann upp á sítt egna djór, reiðir hann til eitt herbergi og røktar hann. Dagin eftir tekur hann, úr egnum lumma, tveir denarar, sum skuldi verið nóg mikið at liva av í einar tveir dagar, letur vertinum teir, og biður hann taka sær av manninum. Skuldi tað komið at kosta vertinum meira, bjóðar hann sær til at gjalda tað ið írestar, tá hann næstu ferð kemur framvið aftur. Sámariubúgvin hevði umsorgan fyri honum sum fallin var millum ránsmenn, og ynskti honum at gerast birgur aftur. So kemur tað, sum er høvuðsboðskapurin í hesum líknilsinum. Jesus spyr hin lógkøna: "Hvør av hesum trimum tykist tær er vorðin næsti hansara,

sum fallin var í ránsmannahendur?" Hin lógkøni kemur við einasta møguliga svarinum: "Tann sum gjørdi miskunnarverk ímóti honum." Her vendir Jesus málinum á høvdið. Okkara vanliga hugsan er tann, at næsti okkara - tað er tann, ið vit skulu gera væl ímóti. Men her sigur Jesus, at ein næsti var tann ið gjørdi væl. Næsti mín er sostatt tann, ið ger góðgerðir ímóti mær. Hin miskunnsami Sámariubúgvin er fyrst av øllum ímyndin av einum: nevniliga Jesusi sjálvum. Eins og hin miskunnsami Sámariubúgvin, ið tók sær av honum ið fallin var í ránsmanna-hendur, hevur Jesus tikið sær av neyð okkara og frelst okkum. Tað er hetta lærusveinarnir hava fingið at síggja. Jesus var tann ið hevði tikið sær av syndum teirra. Tað byrjaði longu við Jóhannesi Doyparanum, tá hann peikaði á Jesus og segði: "Sí Guds lambið, sum ber synd heimsins." (Jóh. 1,29 og 35). Lærusveinarnir høvdu funnið ein frelsara. Tað hevði opnað eygum teirra. Tí svarar Jesus manninum, ið spyr: "Meistari" Hvat eigi eg at gera, fyri at arva ævigt lív?" tað sama sum hann ger í hesi frásøgn um hin miskunnsama Sámariubúgvan. Tað er einki vit menniskju kunnu gera. Men tað er ein, ið gjørt hevur alt fyri okkum. Tað er ein, ið hevur frelst og endurloyst okkum frá øllum tí, sum samvitska okkara dømir og ákærir okkum fyri, tá vit síggja okkum sjálvi og lív okkara í ljósi Guds. Guds heilaga lóg kann ikki hjálpa eini menniskju, sum er í vanda. Vit skulu endurgeva tvey ørindi úr einum gomlum sálmi:

Tann lóg, Gud givið hevur,
er væl ein heilag leið,
men lív hon ikki gevur,
og endurføðir ei.
Tá eitur hart man ríva,
í hold sum ei er loyst,
og gamlar syndir níva,
er lógin eingin troyst.

Hon syndaran kann vekja,
við hvøllum toruslag,
men samvitsku ei lekja,
hin stóra dómadag.
Tá Harrans vreiði brennir,
mót syndarinnar dáð,
og undirgang tú kennir,
veit lógin eingi ráð.

Boð og krøv hjálpa ongum menniskja. Lógin deyðar og dømir okkum. Hon ger okkum sanniliga ikki livandi. Tað er harafturímóti júst tað ið Jesus ger. Orðið um Jesus ger livandi. Um hetta sigur hann sjálvur: "Tað er andin sum lívgar, - holdið - tað gamla menniskja - gagnar einki. Orðini sum eg havi talað til tykkara, eru andi og eru lív." (Joh.6,63) Men her munnu tað vera mong ið spyrja: "Hví endar hetta líknilsið við hesum orðum: "Far tú og ger so við?" Setningurin kundi eftir grundtekstinum eins væl verið týddur soleiðis: Lat tað nú vera soleiðis. Orðið "gera" hevur so nógvar týdningar í grundmálinum, sum ikki eru í okkara máli.

Soleiðis stendur til dømis í Matt. 12,33: Ger træið gott, og frukt tess góð. Tað er týtt soleiðis: "Latið annaðhvørt træið vera gott, og fruktir tess eru góðar," og annar máti at umseta hetta uppá, hevði ikki verið rættur.

Júst so er tað her: Lat tað vera soleiðis! Og so mikið meira, sum teir skriftlærdu júst vóru vanir at enda á henda hátt, hvørja ferð teir høvdu hildið fyrilestur. Tá endaðu teir altíð soleiðis: "Lat tað nú vera soleiðis." Tað mest vanliga er at tulka líknilsið sum eina áheitan um at gera væl ímóti næsta sínum. Tað er einki skeivt í tí, at tann síðan verður tikin við í tulkingina, tí tann, ið merkt hevur Jesu miskunn, skal eisini fara út og inna miskunn ímóti øðrum. Samanber líknilsið um tænaran, ið fingið hevði alla skuld sína eftirgivna. Henda meira beinleiðis tulkingin er eisini røtt, men høvuðsendamálið er væl at vísa Jesus sum hin miskunnsama sámáriubúgvan. Henda seinast nevnda tulkingin hevur røtur sínar heilt afturi í Fornkirkjuni. Tann ið tikið hevur ímóti Jesusi, kemur at síggja hann. Um somu tíð fær hann so mangt annað at síggja. Hann skilir so smátt hvat ríki Guds í veruleikanum er. Hann skilir so smátt hvat trúboðan í veruleikanum er. Hann fer so smátt at skilja so mangt annað. Tann ið letur seg frelsa av Jesusi, og sær at Jesus veruliga er vorðin hin miskunnsami sámariubúgvin. Hann fer at vera til stóra signing fyri medmenniskju síni. Við trúnni býr Jesus í hjørtum okkara. Hann ger nýtslu av okkum, fyri ígjøgnum okkum at koma í samband við medmenniskju okkara. Á tann hátt kunnu vit gerast ein miskunnsamur sámariubúgvi fyri onnur. Av okkum sjálvum kunnu vit tað ikki, men tað hendir, tá Jesus býr í okkum, og tá hansara egna sinnalag vinnur fram til onnur menniskju ígjøgnum okkum. Jesus ger tað soleiðis, at neyðin hjá øðrum gerst neyð okkara, og tað verður átrokandi hjá okkum, at tann hjálp, vit hava fingið frá Jesusi, skal røkka fram til onnur menniskju, so teimum kann ognast sama signing, sum vit sjálvi hava funnið í Jesusi. Fær Jesus opna eygu okkara fyri hesum, kann hann eisini siga við okkum: "Sæl eru tey eygu, ið síggja tað tit síggja."

Suni Jacobsen,
týðir.

# Ein konfirmantur

Ein lítil kokkadrongur ið sigldi við einum norskum dampara, kom ein dagin til maskinmeistaran og spurdi, um hann ikki kundi sleppa at verða konfirmeraður, drongurin var tá fjúrtan og eitt hálvt ára gamal. Jú, tað helt maskinmeistarin, tað fór nokk at lata seg gera, tá ið teir komu í havn.

Hetta var annars ein long og drúgv ferð, men alla tíðina var hesin lítli kokkadrongur, so skjótt hann hevði eina fríløtu upptikin av at lesa í lærubók ( katekismus) og bíbliusøgu síni. Hvønn morgun tá klokkan var seks, stóð hann framman fyri hurðini hjá maskinmeistaranum, bankaði uppá og spurdi um hann vildi yvirhoyra seg.

Tá ið nú henda langa og drúgva ferð var at enda, fekk hann at vita, at hann bert við at ganga nakrar fáar dagar til prestin, kundi blíva konfirmeraður. Hann var nú so hjartans glaður.

Dagurin kom, klokkan átta um kvøldi skuldi konfirmantgudstænastan verða í einari lítlari sjómanskirkju.

Mest var tað sjófólk, men ein hátíðarstund varð tað fyri øll ið hoyrdu henda lítla kokkadrongin ið svaraði so skjótt og rætt uppá tað hann varð spurdur um.

"Hví kalla vit hesa bók fyri Testamenti", spurdi prestur. "Jú", svaraði drongurin, "Tá ein ríkur maður doyr, letur hann tað ríkidømi, sum er eftir hann, eftir í einum testamenti".

"Er hendan tá eitt ríkidømi spyr presturin og peikar á Bíbliuna". "Ja, tað er tað største og besta, vit eiga", svaraði drongurin aftur. Øll sum vóru í sjómanskirkjuni hetta kvøld vóru sera rørd, tí hetta var sera grípandi at hoyra henda unga sjómannin, so týðuliga og klárt siga sítt ja framman fyri altarinum. Tað hoyrdist at fyri hann var tað álvara. Og Guð vil og kann hjálpa teimum ið velja at fylgja Jesusi, royna at halda seg frá tí illa og at royna gera tað ið gott er.

Les tína bíbil í sorg og gleði
Tí har skalt tú fáa tað styrki og megi
ið tørvur er á hjá gomlum og ungum
hjá teimum ið tyngjast av byrðunum tungum
Guðs orð er okkum lykt í eydnu og í sorg
Guð faðir sjálvur er sól og vár borg.

Úr donskum
G W



# BARNASÍÐAN

# Jesus hjálpir í dagsins arbeiði og stríði.

"Men tað bar á, meðan mannamúgvan tyrptist um hann og lýddi á Guds orð, at hann sá tveir bátar liggja í fjøruni, men útróðrarmenninir vóru farnir burtur frá teimum og sótu og reinskaðu gørnini.

Og hann fór tá inn í annan bátin...."Luk. 5,1-3.

Men tað bar so á - soleiðis byrjar henda undurfulla søgan um fiskaveiði Pæturs. Tað var ikki bara hesa einu ferðina, at Jesus hjálpti vinum sínum! Nei, ferð eftir ferð kom hann teimum til hjálpar!

Tað munnu ikki vera mong okkara, sum eru fiskimenn og standa og skola gørn. Men so gera vit okkurt annað. Kanska skola vit borðiskar fyri mammu, ella vit gera skúlating. Kanska vera vit fyri onkrum torførum og tungum, kanska eru vit sorgarbundin um okkurt ella bangin. So kemur hann okkum til hjálpar, sum tá ið hann fór umborð á bátin hjá Pæturi - tí hann er hin sami undurfulli Frelsari, sum tá ið hann gekk her niðri á jørðini.

"Setið gørnini út!" segði hann við Pætur. Hann visti jú, hvussu illa hevði gingist um náttina. "Meistari, vit hava roynt alla nátt og einki fingið," segði Pætur, "men eftir tínum orði vil eg seta gørnini út aftur!"

Gerið tit sum Pætur. Lítið á Jesus! Tá vil Gud vælsigna tykkum gerandisdagin í øllum tí, tit gera - ja, alt lívið!

Sum bátarnir hjá Pæturi og vinmonnum hansara vórðu søkkladnir - soleiðis skal lív tykkara verða fylt av Guds gávum! Staðin fyri skulu tit blaka alla stúran og gremjan "fyri borð" - kasta tær yvir á Jesus, "tí hann hevur umsorgan fyri tykkum!" Ja, hugsið tykkum, hvussu undurfult og stórt tað er: Jesus vil hjálpa okkum!

Ein smádrongur, sum var í dýrastu neyð, bað: "Góði Gud, tú, sum ert so stórur, hjálp mær, sum eri so lítil" - og Gud hjálpti!

Hasa bønina biði eg ofta sjálvur - tað mást tú eisini gera!

Vilhelm Munch.

E. Campbell týddi.

# BARNASÍÐAN

## Barnaandaktin

Petra Gregersen

Tøkk veri Guði fyri sína ósigandi gávu. 2.Kor.9,15

Í hesum ørindinum takkar Paulus Guði fyri eina sera góða gávu, sum hann hevur fingið. Eg rokni við, at vit øll eisini hesi jól hava fingið nógvar góðar gávur við navnaseðli á, har tað stóð TIL ........... og FRÁ ..........., og at vit hava takkað teimum, sum hava givið okkum tær. So kunnu vit fara at hugsa um, hví vit hava fingið hesar gávur, hví tað eru fólk, sum keypa ella gera eina gávu og geva júst okkum hana? Jú, orsøkin man ivaleyst vera, at hesi fólkini eru góð við okkum, vilja vísa okkum kærleika og gleða okkum á jólum. Soleiðis er tað eisini við okkum. Tá ið vit gera okkurt í skúlanum ella aðrastaðni, so hugsa vit kanska, at hetta fari eg at geva mammu, babba ella onkrum, sum eg eri góð/góður við í jólagávu. Vit vilja gleða tey við gávuni, sum vit sjálvi hava gjørt, men tá ið vit so síggja tey pakka upp, so eru vit eisini sera spent og gerast fegin, tá ið tey eru glað fyri gávuna. Ja, vit eru glaðari, enn um vit høvdu valt at hava gávuna sjálvi.

Hvørja gávu er tað so, sum Paulus takkar fyri. Jú, hann takkar Guði fyri barnið í krubbuni, sum vit hava hoyrt um eisini hesi jólini. Aftur hesi jólini hevur Guð mint okkum á, at hann hevur givið okkum eina gávu, eina við navnaseðli, har tað stendur TIL ............. FRÁ Guði. Hví man Gud hava givið okkum gávuna Jesus? Jú, tað er av somu orsøk, sum vit geva gávur. Tað er tí, at hann er so góður við okkum. Hann vil gleða okkum.

Tá ið vit fáa eina gávu, so ger tað ikki so nógv, hvussu hon sær út, um pappírið er vakurt og um hann er pakkaður vakurt inn. Nei, tað týdningarmesta er, hvat er í pakkanum. Gávan, sum vit fáa frá Guði sær ikki so dýr út. Eitt barn í einum fjósi liggjandi í eini krubbu sær ikki nógv út, men tá ið vit koma at kenna Jesus, so er hann so góður og dýrabarur, ja, tann besta gávan vit kundu hugsað okkum, og eg rokni ikki við, at nakar okkara vil liva uttan Jesus. Men hvat gera vit, tá ið vit inni í einum pakka, sum kanska ikki sá so spennandi út, finna eina sera góða gávu. Fara vit ikki beinanvegin til gevaran og takka honum? Tað rokni eg við. Men hvussu eru vit yvir fyri Guði. Minnast vit til at takka honum fyri jólagávuna Jesus?

Og hvussu er so á jólum, hava vit Jesus við í okkara jólahaldi. Er tað Jesus, sum ger tað so jólaligt, ella er tað gávurnar, jólamaðurin, jólatræið ella jólamaturin? Tá ið hirðarnir komu til fjósið, skuldu vit ikki trúð, at tað var jólaligt har, men tað var tað, sjálvt um tað ikki luktaði av jólamati og granni og ongar gávur vóru at síggja undir jólatrænum. Tað, sum gjørdi tað jólaligt, var barnið í krubbuni, og hirðarnir gleddust.

Lat okkum bæði á jólum og annars aðrar dagar gleðast um, hvussu gott vit hava tað. Takka fyri allar góðar gávur vit fáa, men í øllum hesum mugu vit ikki gloyma, at Guð hevur givið okkum son sín, tann einasta hann átti at vera frelsari og vegleiðari í okkara lívi. Lat okkum eins og Paulus minnast til at takka fyri hesa ósigandi gávu, sum vit hava fingið.

*Postavgreitt blað*

# BARNASÍÐAN

## Bábelstornið

Petra Gregersen

Í fyrstuni tosaðu øll fólk á jørðini sama mál, men tá ið tey funnu uppá at fara at byggja eina borg, sum skuldi hava eitt torn, sum tey ætlaðu skuldi røkka heilt upp til himmals, steðgaði Gud teimum við at fløkja tungumál teirra. Tá tey ikki longur skiltu hvønn annan, bar ikki til at arbeiða saman, og borgin varð ikki gjørd liðug. Tey skiltust so frá hvørjum øðrum og búsettu seg ymsastaðni á jørðini. Borgin, sum ikki varð liðug, varð kallað Bábel.

Fløkja er eisini komin í orðini, sum standa niðanfyri. Vitið nú, um tit klára at greiða fløkjurnar.

Á M U N G L T U ______________________

R G O B ______________________

M I M L A H ______________________

Ð G U ______________________

E S B I R L O Á N B T Ð ______________________


**Umbróting:** Brandur Petersen

**Prent:** Estra

**Ábyrgd:** Kristian Thorleifsson

**Útgevari:**
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 225511
T-postur: kmf@kmf.fo
Heimasíða: www.kmf.fo
Konta: 9181-495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað kemur út 8 ferðir um árið (1/2, 15/3, 1/5, 15/6, 1/8, 15/9, 1/11, og 15/12)

Haldaragjald: kr. 150,-